HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið - Fíggjarnevndin
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

15. juni 2020
**Mál**: 20/00206-34
**Tygara Skriv**: LM 145/2019
**Viðgjørt**: Klik her for at angive tekst.

**LM: 145/2019 Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri juni 2020**
Landsstýrismaðurin í heilsumálum var í dag á fundi við Løgtingsins fíggjarnevnd. Á fundinum varð biðið um at fáa sendandi lýsing av umrøddum meirútreiðslum hjá Landssjúkrahúsinum, ið ikki eru við í eykajáttanarumbønini. Tær eru settar her niðanfyri.

**Øktar rakstrarútreiðslur**
*Sáttmálar*
Fíggjarlógin fyri 2020 varð samtykt, áðrenn lønarsamráðingar vóru lidnar. Lønarframskrivingarnar vóru 2,2%. Nú nakrar sáttmálasemjur eru gjørdar, hevur tað víst seg, at nakrar semjur kosta meiri, eins og hædd ikki er tikin fyri lønarstigshækkingum.

Meirkostnaðurin fyri Landssjúkrahúsið av sáttmálanum og lønarstigsbroytingum vegna Starvsmannafelagið, Serlæknafelag Føroya og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar er mettur at verða nærum 7 mió. kr.

**Lønarútreiðsluhækkingar fyri 7 mió. kr. stava frá (í tús. kr.):**

| | |
|---|---|
| **6.000** | **Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar** |
| **420** | **Starvsmannafelagið** |
| **510** | **Serlæknafelag Føroyar** |

*Rakstur*
Stórur vøkstur, sum er tilsamans 4,1 mió. kr., er væntandi í útreiðslunum til millum annað heilivág, viðgerðarvørur og rannsóknarstovukanningar.

Trýstið á kommunulæknavaktina 1870 á Landssjúkrahúsinum er økt munandi í mun til upprunaligu metingina av tørvinum, og neyðugt er at økja um manningina. Mett verður at tað kemur at kostað 1,1 mió. kr.

**Rakstrarhækkingar: 5,2 mió. kr. stava í høvuðsheitum frá (í tús. kr.):**

| | |
|---|---|
| **1.500** | **Heilivágur** |
| **600** | **Vørur til viðgerð og røkt** |
| **1.500** | **Rannsóknarstovukanningar** |
| **500** | **SEV-útreiðsluhækking** |
| **1.100** | **Kommunulæknavaktin** |

Tilsamans vanta um 12,2 mió. kr. í til rakstur til vanliga virksemið. Um okkurt er at spyrja um ber til at venda sær til Heilsumálaráðið.

Vinaliga
Heilsumálaráðið